# Heilsutrygd, staðseting og smærru sjúkrahúsini

BJØRN KALSØ
løgtingsmaður



Stór øsing hevur staðist av, at nýggi stovnurin, Heilsutrygd, er staðsettur í Klaksvík. Serliga hava fleiri framstandandi tinglimir og fyrrverandi landsstýrismenn givið ilt av sær og funnast at avgerðini. Arbeiðsplássini á stovninum hava týdning fyri økið, men kunnu tó ikki koma ístaðin fyri annað, eitt nú Klaksvíkar sjúkrahús.

**Poul, Bjarni og Jógvan vilja heldur Havnina og Fuglafjørð**

Poul Michelsen, Bjarni Djurholm og Jógvan á Lakjuni, tingmenn og fyrrverandi landsstýrismenn, hava givið ilt av sær í samband við avgerðina at leggja nýggju Heilsutrygd í Klaksvík. Sambært teimum verður ætlanin skýrd lokalpolitisk, lítið skilagóð og ein roynd hjá landsstýrismanninum í heilsumálum at vinna sær atkvøður í Norðoyggjum.

Sambært omanfyrinevndu hevði verið rættari at staðsett stovnin ávikavist í Havn og Fuglafirði. Og so kann ein spyrja um orsøkirnar handan hesar niðurstøður kunnu sigast vera stórt øðrvísi enn tær, landsstýrismaðurin verður skuldsettur fyri.

**Eftir bókini**

Sjálvur haldi eg, at málið um staðseting av Heilsutrygd er handfarið eftir bókini. Talan er um nýggjan stovn, sum sambært samgonguskjalinum skal leggjast uttan fyri Havnina. Spurningurin er viðgjørdur í landsstýrinum. Dugi tí ikki at skilja áhaldandi øsingina og mótstøðuna avgerðin hevur elvt til.

Fleiri góðar orsøkir kunnu leggjast til grund fyri hesi avgerð. Ein tann mest eyðsýnda er, at arbeiðsloysið í Norðoyggjum er tað hægsta í landinum í løtuni. Nýggj almenn arbeiðspláss eru tí kærkomin.

**Áheitan á landsstýrismannin í heilsumálum**

Arbeiðsplássini á Heilsutrygd eru kærkomin, men kunnu tó ikki koma ístaðin fyri annað, eitt nú Klaksvíkar Sjúkrahús. Hugsi serliga um tryggleikan fyri íbúgvarnar í økinum umframt arbeiðsplássini.

Seinastu dagarnar hava leiðslurnar á smærri sjúkrahúsunum funnist at sentralistiskum ætlanum í Heilsumálaráðnum, serliga í samband við arbeiðsgongdina í samband við serviðgerðir uttanlands, heimtøkur og eina samstarvsavtalu, sum ætlanin er at gera.

Eri ikki sørt skakkur av hesum tíðindum, tí í samband við fíggjarlógarviðgerðina varð stórur dentur lagdur á hesi viðurskifti frá fíggjarnevndarmeirilutanum, har eg sjálvur var partur. Í tí sambandi váttaði landsstýrismaðurin, at frælsið hjá hvørjum einstøkum sjúkrahúsi ikki skuldi verða skert í samband við serðviðgerð uttanlands og heimtøkur.

Í álitinum til fíggjarlógina stendur m. a.:

"Undir viðgerðini hevur landsstýrismaðurin váttað, at serlæknar á teimum trimum sjúkrahúsunum hava rætt til at ávísa sjúklingar til sjúkraviðgerð uttanlands. Somuleiðis skulu tey trý sjúkrahúsini, hvør í sínum lagi, hava møguleika at fremja heimtøkur av sjúkraviðgerð í framtíðini. Heimtøkur skulu tó sum áður góðkennast av Heilsumálaráðnum. Meirilutin í nevndini leggur dent á, at omanfyristandandi mannagongd verður fylgd fyri ikki at skerja frælsið hjá hvørjum einstøkum sjúkrahúsi í samband við serviðgerð uttanlands og heimtøkur"

Út frá hesum liggur tí púra fast, at virkismøguleikarnir og rættindini hjá smærru sjúkrahúsunum ikki skulu skerjast í samband við serviðgerð uttanlands og heimtøkum av sjúkraviðgerð.

Í Sosialinum 21. januar framgongur tó, at landsstýrismaðurin í heilsumálum hevur gjørt av, at tað nú skulu verða leiðandi yvirlæknar á Landssjúkrahúsinum, sum skulu hava ábyrgdina av allari játtanini til serðviðgerð uttanlands. Og at teir nú skulu gera av hvørjir sjúklingar verða sendir til viðgerðar uttanlands. Fái meg illa at trúgva, at landsstýrismaðurin hevur tikið slíka avgerð ímóti ynskinum hjá samgongumeirilutanum.

Fari kortini at heita á landsstýrismannin í heilsumálum, Aksel V. Johannesen, um at bera so í bandi, at gjørdar politiskar avtalur verða hildnar í samband við hetta týdningarmikla mál.

# Góði Daniel J. Thomsen: legg ikki Hans Paula Strøm undir misgerðir hjá Rósu Samuelsen!

HANS PAULI STRØM
løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin



**- fegnast heldur um at við Heilsutrygd rætta vit mistøkini uppafturi, og meir enn tað !**

Háttvirdi Daniel J. Thomsen ("ikki dølskur akademikari" sambært egnum orðum) leggur harðliga eftir mær í avdeyðu sambandsurguni Dimmu, og spyr, um eg eri forherðaður!

Kanska - í onkrum førum óivað eitt sindur - hvør er heilt fríur?

Men Daniel J.Thomsen tekur so grúiliga feil, tá hann leggur meg undir at hava hækkað egingjaldið hjá honum og øðrum pensjonistum fyri heilivág.

Tí tað kann hann takka síni egnu partakvinnu fyri, landsstýriskvinnu Sambandsfloksins í almannamálum, Rósu Samuelsen. Hinvegin kann hann takka landsstýrismanni Javnaðarfloksins í Heilsumálum, Aksel Johannesen fyri, at vit nú rætta henda skaðan uppaftur – og meir enn tað.

Daniel J. Thomsen sigur, at síðan hann "gjørdist fólkapensjonistur og havi fingið heilivág, havi eg alla tíðina havt eitt hámark fyri egið gjald uppá 200 kr. um ársfjórðingin."

Og so pástendur Daniel J. Thomsen, at "Áðrenn Hans Pauli Strøm fór frá sum landsstýrismaður, gjørdi hann tað bragd, at seta egingjaldið hjá pensjonistum til kr. 600 um ársfjórðingin".

Nei takk, mín góði harra Daniel. Hetta kanst tú takka Sambandsfloksins landsstýriskvinnu, Rósu Samuelsen fyri. Skjalprógvið hevur tú her:

**"Kunngerð um stuðul til heilivág v.m. eftir almannapensjónslógini", nr. 92. frá 23. juni 2009"**, har tað stendur soleiðis í §3 um egingjaldið fyri stuðul til heilivág:

**"Egingjald**

§ 3. Pensjónistur, sum í mesta lagi hevur eina inntøku, pensjón íroknað, ið svarar til fólkapensjón og útgjald úr arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum,rindar sjálvur tær fyrstu kr. 400,- um ársfjórðingin.

Við inntøku er at skilja inntøka sambært § 20 í løgtingslóg um almannapensjónir umframt pensjón og útgjald úr arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum. Stk. 2. Aðrir pensjónistar gjalda sjálvir tær fyrstu kr. 600,- um ársfjórðingin."

Signerað Rósa Samuelsen, tann 23. juni 2009.

Við hesi broyting fór egingjaldið hjá flestu pensjonistum upp í 400 ella 600 kr um ársfjórðingin. Og hevur verið tað líka til nú.

Men tíbetur hevur tað eydnast okkum at rætta hetta uppaftur. Tí beint fyri jól samtykti løgtingið einmælt uppskotið um Heilsutrygd hjá landsstýrismanni Javnaðarfloksins í Heilsumálum, Aksel Johannesen.

Eitt høvuðsmál í nýggju lógini er ein nýggj tilskotsskipan fyri heilivág, sum kemur í gildi 1. apríl 2010. Tá verður hámarkið fyri egingjald hjá pensjonistum – Daniel J. Thomsen o.ø. – sett til 1195 kr. um árið, svarandi til knappliga 100 kr. um mánaðin. Og hjá øllum øðrum brúkarum av heilivági verður hámarkið fyri egingjaldið 1600 kr. um árið, svarandi til 133 kr. um mánaðin.

Haraftrat kunnu Daniel J. Thomsen og aðrir pensjonistar eftir nýggju lógini aftur fáa tilskot til kostískoyti o.o. heiliráð, sum landsstýriskvinnan hjá Sambandsflokkinum, Rósa Samuelsen, spardi burtur í fjør. Eins og hann og allir aðrir brúkarar nú fáa rætt til fleiri ókeypis heilsutænastur við nýggju Heilsutrygd, enn tað var frammanundan.

Persónliga fegnist eg stórliga um hetta, tí øll tann nýggja skipanin við Heilsutrygd var eitt mál, ið eg sjálvur sum landsstýrismaður setti í gongd og bar upp í hendurnar á mínum eftirfylgjara at seta í verk. Sum hann hevur gjørt so væl, við ABC-samgonguni í rygginum - enn eitt gott Javnaðarmál, sum Sambandið og Fólkaflokkurin tóku undir við at fremja – og sum eisini Daniel J. Thomsen kann frøast um.

# Kobraslangan Virgar

DÁVID ISFELD



Kobraslangan og Virgar T. Dalsgaard hava í hvussu er eitt til felags, og tað er eitur; men Virgar er ikki líka beinrakin við sínum eitri. Eitrið hjá Virgar rakar tíverri øll, ið hætta sær at lesa hansara greinir.

**Hví vera so ljótur í munninum?**

Eg havi lisið einar tvær greinir hjá Virgari Dalsgaard áður, og nú hesa í Sosialinum 20. januar, og tær eru allar líka ófantaligar. Í hesari rópar hann miðlamenn »undarligir mikrofon-dreingir« og »hjálparloysingar«. Og so er tað tjóðveldisfólk (og óivað eisini øll fullveldisfólk). Tjóðveldisfólk eru »fjaðursár og fantasileyst lið av loysingum«, »sosialir og nationalir 'brotsmenn'«, »loysibløkur«, »fullveldisdólgar«, »politiskt insolventir tjóðveldisóvitar«, »ábyrgdarloysingar«; og í einum setningi sigur hann soleiðis: »Níðingsgerðin hjá loysingum var einki minni enn fíggjarlig og social terrorisma!« Ja, enntá við rópitekin aftan á orðið »terrorisma«. Meinar Virgar, at tjóðveldisfólk eru terroristar? Er hesin maðurin sálarliga illa fyri, ella hevur haturin fyri tjóðveldisfólki eti hann upp innan, og tikið ræði á honum og øllum, ið vakurt, menniskjaligt og gott er?

Tá eg at enda las »Vinarliga og gott nýggjár!« skilti eg hetta sum ta síðstu sarkastisku viðmerkingina, tí at alt annað í greinini var so ljótt. Ikki hevði verið av leið, um redaktørurin á Sosialinum sendi slíkar greinir aftur til rætta viðkomandi um at bøta um valdu orðini og máliskurnar. Tað er einki forgjørt í at virka fyri sømiligum orðingum og sostatt sømiligum greinum.

Eg eri stórur fjeppari at talufrælsi, tí vit velja hóast alt hvat og hvørjum vit lesa og lurta eftir - vóni bara ikki, at ljótu orðini hjá Virgari røkka barna- og ungdómsoyrum, tí her er eingin lærdómur, bert dómur. Eitur, sjálvrættvísi og dómur uttan fyrilit fyri próførslu, skilagóðum argumentum og vanligum fólksiði; tað er hansara mannagongd í viðgerð av politikki og fólkum, ið luttaka í politikki og politiskum kjaki.

Eg var í einum útmerkaðum kjaki við Helga Abrahamsen fyri stuttum umvegis tíðindabløðini í Føroyum. Tað var eitt sakligt og sømiligt kjak. Vit vóru rættiliga ósamdir, men tað gekk ikki út yvir málnýtsluna og góðum fólksiði. Les hvussu onnur fólk skriva, Virgar, og tak við læru - ongantíð av gamal at læra.

Veit ikki hvørja barlast av lærdómi Virgar hevur, men lærdómur og vísdómur fylgist ikki altíð at - ein telda kann sitera øll verkini hjá Shakespeare út í eitt, men hon veit ikki hví.

**Tíðarinnar tonn og eftirmæli**

Tá tíðarinnar tonn hevur gnagað síðsta pettið av penninum hjá Virgari Dalsgaard, vænti eg, at hansara flogleysu orð verða líka lítið saknað av føroyingum, sum týsk bumbuflogfør yvir London eru saknað av londonarbúgvum.

